# Ein sjarmerandi egningarmaður

**Hóast hann bert er 12 ára gamal, kann Walter Nýsted úr Klaksvík, longu teljast millum royndar egnarar. Fyri einum ári síðani byrjaði hann at egna, og nærum hvønn dag eftir skúlatíð er hann í skúrinum, fyri at vinna sær nakrar krónur**

EGNING
*Rúna Sivertsen*

Tá Walter byrjaði at egna, ynskti hann sær eina fartelefon, og hana hevur hann longu keypt sær.

- Nú samli eg til eina teldu, og eg eigi 9000 krónur, sigur hann smílandi.

Walter er ein raskur og serstakliga hugagóður drongur. Tað kemur meiri enn so fyri, at hann fer í skúrin á veg í skúla, fyri at vita, um nakað verður at egna eftir skúlatíð.

Vanliga klárar hann tveir stampar eftir skúlatíð og onkran leygardag heilt upp í seks.

- Úrtøkan hjá Walter liggur um 1000 krónur um vikuna, sigur mamma hansara, Sigrid.

### Sosialur týdningur

Tað hevur stóran sosialan týdning fyri dreingirnar at sleppa at egna, sigur Poul Sivar Sivertsen, tá vit ringdu umborð á útróðrarbátin, Søkin, sum Walter egnir hjá.

Hann sigur, at tað sanniliga eisini hevur týdning fyri útróðurin, at dreingirnir hanga í, tí uttan teir fóru vit mangan ikki út fyri línu.

- Dreingirnir halda okkum uppi, og fyri teir er tað gott at sleppa at arbeiða millum vaksnar menn, sigur hann.

- Poul Sivar sigur einsini, at stuttligt er at síggja, hvussu hugagóðir teir eru.

Tá vit koma aftur av útróðri eru teir á støð hjá okkum, fúsir at taka eina hond í, sigur hann.

Millum egnararnar finnast eisini gentur, og tær standa einki aftan fyri dreingirnar, sigst.



*Í einum av mongu egningaskúrunum á Stongunum í Klaksvík, funnu vit 12 ára gamla Walter Nýsted. Hann er sjáldsama hugagóður egnari, siga teir, hann egnir hjá. Umframt at vera ein góð inntøkukelda hjá gentum og dreingjum, hevur egning eisini sosialan týdning fyri tey ungu*

# Spennandi jólakonsert í Ósáskúlanum

**Í kvøld fara Leirvíkar Gentukór og kvinnukórið, Suð úr Klaksvík, at syngja í høllini í Ósáskúlanum í Klaksvík. Hóskvøldið sungu tær í Mentanarhúsinum í Fuglafirði, og var sangur teirra ein sonn fragd fyri oyra**

JÓLAKONSERT
*Rúna Sivertsen*

Tey, sum fóru í Mentanarhúsið í Fuglafirði hóskvøldið, fóru ikki vónsvikin avstað aftur. Tey bæði kvinnukórini høvdu lagt eina spennandi og øðrvísi konsert til rættis.

Meðan tær framførdu sangirnar, vórðu orðini uppvarpaði á veggin saman við vøkrum náttúrumyndum úr Føroyum. Millum sangirnar, las John Færø brot úr verkinum, Kærleiki Kristusar eftir Ahasverus, sum Jógvan Gerðalíð týddi til føroyskt.

Til Adoramus te, eftir G.B. Martini, dansaði Unnur Sjúrðardóttir Fonn.

Sangur, upplestur og dansur vóru ein frøi fyri oyra og hvíld fyri sinni í hesi strongdu jólatíð.



*Suð Í kvøld kl 20.00, verður ein spennandi og øðrvísi konsert í Ósáskúlanum í Klaksvík. Tað er Leirvíkar Gentukór og kvinnukórið, Suð úr Klaksvík, sum hava felags jólakonsert. Fremst á myndini síggja vit Steinvor Fonn, kórleiðara hjá Suð. Leiðari fyri Leirvíkar Gentukóri er Dánjal Eysturstein*

*(Mynd: Bárður K. Hansen)*

### Í Ósáskúlanum

Skráin til konsertina í Ósáskúlanum í kvøld kl. 20.00, verður hin sama sum í Mentanarhúsinum.

Fyrst syngur Leirvíkar Gentukór sjey sangir, sum upprunaliga eru yrktir á svenskum av Britt G. Hallquist, við løgum eftir John Højbye.

Eftir ein stuttan steðg, kemur Suð á pallin við brotum úr kendum verkum, eitt nú Gandafloytuni hjá Mozart.

Jógvan við Keldu verður frásøgumaður, og eftir konsertina verður kaffi og smákøkur at fáa.



Bergtóra Hanusardóttir:

# Javnstøða, burðardygg menning og friður

RØÐA

Tann 25. november var fólkafundur ímóti harðskapi ímóti kvinnum fyri fyrstu ferð hildin í Føroyum, og nógv brigdi av hesum ódámliga og forkastiliga atburði vóru borin fram í ljós og sett á svartalista sum eitt neyðugt stig á strævnu leiðini at koma teimum til lívs.

Hetta takið aftrat teimum mongu, ið longu eru tikin, fáa okkum vituligt ikki á mál, men vónandi verða so komandi 25. novemberdagar brúktir til at taka saman um so komast kann longur fram á leiðini ímóti einum samfelag, har javnstøða, burðardygg menning og friður valda, hesi slagorðini sum heldur ikki í hesum samanhangi koma sum kettur úr høvdatrog, hóast onkur kanska vil halda tað.

Hetta hava verið slagorðini á kvinnuráðstevnum ST´s, og eg eri sannførd um, at tey har yviri hava grein í sínum máli. Tað er veruliga samband millum javnstøðustøðið, burðardyggu menningina og heimsfriðin eins og tað eisini eru beinleiðis linjur millum alt slag av harðskapi ímóti kvinnum og tey nevndu trý hugtøkini, millum miðvísa tøku av gentufostrum, umskerðing av smágentum, konubuking, neyðtøkur og sadistiska porno, millum lága ella onga løn fyri strævið arbeiðið og prostitutión, millum eyðræning av náttúrutilfeingi, rán og sølu av kvinnum, dálking av umhvørvi, hjálandaveldi og væl fyrireikað kríggj, produserað til egnan materiellan vinning, eisini tað kríggið ið hesaferð alt sum tað er eftir ætlan skal sprænast beint inn í spenningsnervarnar á øllum heimsins hampafólki inni í teirra egnu stovum.

Hjá okkum sum so manga aðrastaðni verður sagt, at vit hava javnstøðu bara kvinnur sjálvar vilja, og at javnstøðulógin í grundini er óneyðug. Men hví hava vit so henda vaksandi harðskapin ímóti kvinnum og børnum? Hví veksur kappingin og harðskapurin á øllum økjum, eisini tí sum oyðileggur okkara felags móður jørð og í veruleikanum eisini okkara eftirkomanum teirra lívsgrundarlag? Hví hava vit so lítla umsorgan fyri lívinum uttan um okkum, og hví hirða vit so lítið um tað sum lívgar bæði sál og likam? Er tað veruliga kvinnurørslan og javnstøðuarbeiðið ið hevur ábyrgdina av hesum óskili? Og skal nú alt kvennkyn bukast og neyðtakast upp á pláss aftur fyri stríðið? Skulu vit ikki tora út um eina gátt longur? Ella er tað tíð uppá at krita skógvarnar eina ferð enn og halda fast við, at tað eru vit sjálvar sum hava ognar- og avgerðarrættin til okkara kropp og lív, og at vit hava fullan rætt til at ferðast í friði, eisini um næturnar?



*Bergtóra Hanusardóttir*

Eg haldi framvegis, at patriarkalska mentanin er syndarin ella høvuðssyndarin, um tað fellur í betri jørð. Ikki mannfólk sum so, ikki dreingir og menn, hóast teir eru føddir sum kyn nummar eitt, men tann gamla patriarkalska og nú moderniseraða mansmentanin vit enn liva í, hetta samfelagið sum bara er ballað so mikið inn í pengar og stás, at samanhangurin kámast og lumpar sjálvt kvinnur at halda væl standa til.

Tað skal tó framvegis vera mín vón, at øll hesu smáu fetini fara at enda við einum rungandi nei til allan harðskap ímóti kvinnum og børnum, okkum øllum til eyðnu og sóma.

Kvinnuhúsið og Kvinnufelagið takkar tykkum, sum hava tikið eina hond í fyri at fáa henda fundin í lag við so stuttum skotbrá. Eisini tykkum ið komu á fundin at taka lut og stuðla uppundir takka vit hjartaliga, og ikki minst takka vit Ingun Simonsen fyri sangin, sum saman við kyndlunum setti sín serliga dám á tiltakið.

Takk fyri øll!

# Annika forkvinna í javnstøðunevndini

**Landsstýrismaðurin í almannamálum, Páll á Reynatúgvu, hevur valt nýggja javnstøðunevnd**

JAVNSTØÐUNEVND
*Eirikur Lindenskov*

Nýggja forkvinnan í javnstøðunevndini er Annika Wardum Joensen. Hon er 36 ára gomul, er útbúgvin cand. negot. í enskum. Hon hevur starvast á Ferðaráð Føroya, har hon var stjóri frá 1997 til 2000. Hon hevur nú egna ráðgevingarfyritøku í Tórshavn.

Páll á Reynatúgvu fegnast um, at Annika W. Joensen játtaði at taka sessin sum formaður í javnstøðunevndini. Hann er fullvísur í, at Annika við sínum eyðsædda áhuga fyri javnstøðuspurningum, fer at røkja sessin til fulnar.

Sjálv sigur Annika seg hava nógvar ítøkiligar ætlanir, men hon ætlar sær at tosa við alla nevndina um, hvussu hesar ætlanir kunnu verða veruleiki.

Forkvinnan er umboðið hjá landsstýrismanninum í javnstøðunevndini. Hinir 4 limirnir verða valdir eftir tilmæli frá arbeiðstakarunum, arbeiðsgevarunum, Kvinnusamskipan Føroya og Mentamálaráðnum. Hesir limirnir eru

Jan Mortensen, sum umboðar arbeiðsgevararnar

Jákup Páll Mohr Mortensen, sum umboðar arbeiðstakararnar

Jancy E. Olsen, sum umboðar Kvinnusamskipan Føroya

Hanna Ziskason Hansen, sum umboðar Mentamálaráðið.



*Annika Wardum Joensen er nýggj forkvinna í javnstøðunevndini*

Uppgávurnar hjá javnstøðunevndini eru at vera ráðgevi hjá myndugleikum, stovnum, feløgum og einstaklingum í javnstøðuspurningum, og at hava eftirlit við, at javnstøðulógin verður hildin.

Tað yvirskipaða endamálið við javnstøðulógini er at beina burtur allan mismun vegna kyn, og at veita kvinnum og monnum eins møguleikar til útbúgving, arbeiði, umframt yrkisliga og mentanarliga menning.

# Gunnar Hoydal fær Mentanarvirðisløn landsins

**Og Axel Tórgarð fær Heiðursgávu landsins. Virðislønirnar eru ávikavist 150.000 og 75.000 krónur**

HEIÐURSLØNIR
*Eirikur Lindenskov*

Mentanarvirðisløn Landsins verður í ár latin Gunnari Hoydal, rithøvundi. Tað er landsstýrismaðurin í mentamálum, ið letur Mentanarvirðislønina eftir tilmæli frá nevnd umboðandi føroysk listafólk og Mentamálaráðið. Virðislønin er 150.000 kr og er hin størsta av sínum slag í Føroyum.

Mentanarvirðisløn Landsins verður latin føroyskum listafólki sum tøkk fyri útint listaligt avrik innan skaldskap, myndlist, leiklist, tónlist ella aðra list. Til tess at fáa Mentanarvirðislønina skal virðis-lønarevnið hava skapað listaligt verk á høgum listaligum stigi, ið ger, at virðislønarevnið má haldast at hava uppiborið henda heiður. Í fjør varð Eyðun Johannessen, leikstjóri, heiðraður við Mentanarvirðisløn Landsins.



*Gunnar Hoydal, rithøvundur, fær Mentanarvirðisløn landsins hesarferð. Hon er upp á 150.000 krónur*

Í grundgevingum sínum sigur nevndin:

»Mentanarvirðisløn Landsins verður latin Gunnari Hoydal fyri fjøltáttaða avrik hansara innan føroyska list og mentan. Gunnar hevur í bundna og óbundna skaldskapi sínum flutt mørk. Hann ferðast á longu skaldaferðum sínum úti í heimi, men alla tíðina eru Føroyar - upprunin og heimlandið - í eygsjón og partur av hesum heimi. Tá ið hann í greinum og orðingum hevur lætt ljóðið av um føroyska list, listafólk og serstakliga byggilist, hevur hann altíð borið hugtakandi og smidliga skaldakynstur sítt við sær. Gunnar Hoydal eigur sín stóra lut í varðveitingini av gomlu Havnini, og er verk hansara ein samfingin heild av dygd og skapi.«

### Axel Tórgarð fær Heiðursgávu landsins

Umframt Mentanarvirðisløn Landsins letur landsstýrismaðurin í mentamálum eisini Heiðursgávu Landsins, ið er kr. 75.000. Sama nevnd ger tilmæli til landsstýrismannin, og verður Heiðursgáva Landsins í ár latin Axeli Tórgarð.

Heiðursgáva Landsins verður latin einstaklingi, felag ella fyritøku sum tøkk og viðurkenning fyri at hava framt avrik, ið hava ella hava havt serstakan stóran týdning fyri føroyska list og/ella føroyska mentan og mentanarlív. Í fjør varð Fuglafjarða Sjónleikarafelag heiðrað við Heiðursgávu Landsins.

Nevndin sigur í grundgeving síni:

"Heiðursgáva Landsins verður latin Axeli Tórgarð fyri týðingar hansara av klassiskum heimsbókmentum til føroyskt mál. Axel hevur hegnisliga latið hesar mentanarligu dýrgripir í ein føroyskan málbúna á ein hátt, sum í sjálvum sær kann metast sum skaldskapur. Týðingar hansara av eitt nú forngriksku harmleikunum Antigone, Medea og Agamemnon, og fleiri av stóru leikunum hjá Shakespeare, m.a. Julius Caesar, Macbeth og Dreymur jóansøkunátt, eru ótømandi keldur og íblástur fyri mentanarliga og listaliga umhvørvið í Føroyum - serstakliga fyri leiklistina. Axel Tórgarð hevur latið upp ein fremmandan heim fyri føroyingum, og hevur við meistarliga málkynstri sínum gjørt hann heimligan og ævigan."

Landsstýrismaðurin í mentamálum, Annlis Bjarkhamar, handar Mentanarvirðisløn Landsins og Heiðursgávu Landsins á almennum hátíðarhaldi, sum Mentamálaráðið skipar fyri, í Norðurlandahúsinum 15. januar 2003 kl. 20.00.